ÍF-Fleyr 3-0 (25-20, 25-7, 25-22):

# Trýstið verður hildið

**Fleyr fekk ikki givið ÍF stórvegis mótstøðu, so enn halda tær úr Fuglafirði fast um trýstið á Mjølni**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

ÍF hevði eina hampuliga bleyta upphiting til steypafinaluna, tá tær fríggjadagin tóku ímóti Fleyr. Sum kunnugt hevur Fleyr ikki havt eitt av sínum bestu árum, og tað var heldur stórvegis, sum tær fingu gjørt við ÍF, sum uttan stórvegis hóvasták tók sær av øllum trimum settunum.

Við sigrinum legði ÍF seg fyribils á oddasessin, og tó at hesin varð tikin frá teimum bara tveir dagar seinni, so var tað av stórum týdningi, at tær soleiðis framhaldandi hildu fast um trýstið á Mjølnir, sum enn er fremsta liðið. Munurin er tó lítil, og framvegis er tað helst so, at tað verða innanhýsis dystirnir millum fyrst og fremst hesi bæði liðini umframt TB, sum fara at verða avgernadi fyri, hvat gullmerkini fara.

Fyrst er tó steypafinalan á skránni hjá ÍF. Her hava tær ongan tíð verið áður, men tað merkir ikki, at tær ikki hava møguleikan at vinna. Tvørtur ímóti hava tær vunnið allar tríggjar dystirnar, sum tær hava hitt TB í ár, og lítið er at ivast í, at tað verða heilt nógvir fuglfirðingar, sum fara til Havnar komandi vikuskiftið.

KÍF-TB 0-3 (10-25, 20-25, 16-25):

# Tryggur TB-sigur

**KÍF megnaði ongan tíð at hótta TB, tá liðioni hittust í Hoyvíkarhøllini sunnudagin**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at hondbóltskvinnurnar úr Vági leygardagin høvdu verið í Havn, har tær ognaðu sær steypavinnaraheitið fyri hetta kappingarárið. Komandi sunnudag fara flogbóltskvinnurnar av Tvøroyri at royna at gera teimum kynstrið eftir, men áðrenn tær kundu hugsa somikið langt, skuldu tær ein upphitingartúr til Havnar.

Hesa ferð gekk leiðin til Hoyvíkarhøllina, har KÍF hevur heimavøll. KÍF hevur í ár fyri fyrstu ferð roynt seg í bestu deildini, men tað er ígjøgnum árið vorðið alsamt greiðari, at tað í fyrsta umfari helst bert verður talan um hetta eina árið.

Móti føroyameistarunum úr TB formáddu kollfirðingar sær heldur ikki nakað serligt. TB var greitt við yvirlutan frá byrjan til enda, og vístu snøgt sagt tann klassamun, sum eigur at vera millum topp og botn.

Heilt í topp eru tær av Tvøroyri tó ikki, og skulu tær koma somikið langt, er eisini neyðugt, at tær fáa hjálp aðra staðni frá, umframt at tær sjálvar skulu vinna allar sínar dystir.

Hesa seinnu treytina hava tey so framvegis møguleikan at lúka, og ivaleyst vildi tað eisini givið sjálvsálitinum eitt skump rætta vegin, um ÍF verður koppað um vikuskiftið, men tann spurningurin fer so at standa ósvaraður í nakrar dagar afturat.

Mjølnir-Dráttur 3-0 (25-23, 25-17, 25-14):

# Klaksvíkingar koyra á



*Fyrsta settið argaði Dráttur eitt sindur, men tá Mjølnir hevði togað hetta heim, skúgvaðu tær alla mótstøðu til viks í næstu settunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Oddaliði úr Klaksvík mátti stríðast eina løtu, men tá gongd fyrst var komin á var einki hjá Drátti at gera**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Heimasigrar á hinum báðum FM-biðlunum, ÍF og TB, hava seinastu vikurnar flutt Mjølnir av triðja upp á fyrsta plássið í bestu kvinnudeildini, og nú ræður fyrst og fremst um hjá teimum at halda seg fastar á hesum plássinum.

Sunnudagin høvdu tær vitjan av Drátti, og á pappírinum var í øllum førum einki at ivast í, at heimaliðið var favorittur at vinna. Dráttur hevur í ár sýnt sera óstøðug avrik, har tær stundum hava argað oddaliðini, fyri síðani at fara í kjallaran móti veikaru liðunum í deildini, og fyrstu løtuna sunnudagin bendi okkurt á, at tær væl kundu arga Mjølnir.

Alt fyrsta settið á tamb hildu tær sera stutt tjóður í oddaliðnum, men tá Mjølnir so kortini fekk fatur á avgerandi bóltunum, skramblaði at saman hjá Drátti. Tey bæði næstu settini blivu uttan stórvegis hóvasták fingin til høldar, og enn eru tær hjá Mjølni soleiðis einsamallar á odda í bestu deildini.

Um hetta fer at halda sær alt árið, er ilt at siga, men kortini til hetta hava tær hjá Mjølni sjálvar. Komandi dysturin hjá teimum verður kanska tann, sum ger av, hvar gullið skal fara, tá tær vitja á Kambsdali. Undan hesum hava tær tó eitt frívikuskifti, tá steypafinalurnar eru á skránni, og hóskandi kunnu tær so nýta hetta til at fyrireika seg til dystirnar móti argastu kappingarneytunum. Soleiðis kann væl verða, at Mjølnir fer at fáa okkurt burturúr finaludystinum, hóast tær fyri fyrstu ferð ikki eru beinleiðis partur av hesum.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 16 | 13 | - | 3 | 43 | 14 | 29 | 19 |
| 2 ÍF | 16 | 13 | - | 3 | 43 | 18 | 25 | 18 |
| 3 TB | 16 | 12 | - | 4 | 41 | 15 | 26 | 16 |
| 4 Dráttur | 16 | 6 | - | 10 | 23 | 38 | -15 | 7 |
| 5 Fleyr | 16 | 3 | - | 13 | 13 | 41 | -28 | 5 |
| 6 KÍF | 16 | 1 | - | 15 | 8 | 45 | -37 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 13 | 11 | - | 2 | 35 | 8 | 27 | 14 |
| 2 Mjølnir | 13 | 8 | - | 5 | 27 | 20 | 7 | 11 |
| 3 SÍ | 13 | 7 | - | 6 | 23 | 21 | 2 | 11 |
| 4 Fram | 12 | 6 | - | 6 | 22 | 20 | 2 | 8 |
| 5 Fleyr | 13 | 0 | - | 13 | 1 | 39 | -38 | 0 |



Mjølnir-SÍ 1-3 (25-23, 23-25, 21-25, 18-25):

# Gullið kámaðist



*Klaksvíkingar hugsaðu kanska ov nógv um gullmøguleikan, tá SÍ var á vitjan, og tá sørvingar fingu møguleikan, lótu teir ongan tíð hendan fara frá sær*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Klaksvíkingar mundu missa vónina um gullmerkini, tá teir á heimavølli máttu lúta fyri væl leikandi SÍ**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbóltsfepurin, sum seinastu vikuna hevur herjað í Klaksvík, er kølnaður nakað.

Menninir hjá Mjølnir høvdu annars av álvara strítt seg inn í gulldystin við sigrinum á ÍF seinasta vikuskifti, og nú skuldu teir staðfesta oddastøðuna, tá SÍ kom á vitjan.

Tað gongst tó ikki altíð eftir vild, og tað máttu klaksvíkingarnir sanna, tí sørvingar sýndust at vera nógv treiskari enn so, at teir bara løgdu seg niður.

Fyri tað mesta var annars talan um ein sera javnan dyst sunnudagin. Sørvingar vístu longu í fyrsta settinum, at teir so avgjørt ætlaðu sær okkurt heim við aftur, og eftir at Mjølnir fyrst hevði vunnið eitt sett tepurt, gjørdu sørvingarnir tað sama í næsta settinum.

Eftir hetta var tað sum um spælið hjá Mjølni fór at hanga verri saman. Kanska mundi ivin um egnan mátt gera um seg, ella kanska var tað okkurt annað, men úrslitið kom eirindaleyst upp á talvuna. Sørvingar hildu nevnliga á fram við sínum spæli, og tó at munurin ikki var meira enn fýra bóltar, so mundi eingin ivast í, at hetta var uppiborið.

Skuldi Mjølnir venda dystinum, so skuldi hetta gerast í fjórða settinum, men tað var tó skjótt, at trupulleikar tóku seg upp. Sørvingar hildu áfram, har teir sleptu í triðja settinum, og rættiliga skjótt høvdu teir vunnið sær eitt fitt glopp niður til klaksvíkingarnar.

Hetta megnaði Mjølnir ongan tíð at tetta aftur, og so fingu sørvingarnir helst staðfest, at talan ikki var um nakra sensatión, tá teir kring jólini vunnu tvær ferðir á rað móti Mjølni.

### Alt kann henda

Nú bert tríggir dystir eru eftir leika bar úrslitið við sær, at gulldysturin tykist mest sum avgjørdur, men tó ikki meira enn so, at ÍF hevur dystir móti øllum trimum silvurbiðlunum, og við einum tveimum óvæntaðum úrslitum her, stendur eisini gulldysturin opin.

Eitt er tó víst, og tað er, at silvurdysturin er víðopin. Mjølnir og SÍ hava nú bæði 11 stig, meðan Fram á fjórða plássinum hevur átta. Tað hoyrir tó til søguna, at Fram hevur ein dyst til góðar, og gevur hesin fulla úrtøku, er bert tað eina stigið á muni millum hesi trý liðini, so ivaleyst verða tað teir heilt smáu marginalarnir, sum fara at gera av, hvar ávíkavist silvur- og bronsumerkini fara.

Áðrenn teir fara at hugsa somikið langt, mugu sørvingarnir tó fara at fyrireika seg til steypafinaluna, har ÍF tekur ímóti. Betri upphiting enn tað sama kundu teir neyvan fáa, og so er spurningurin, um teir megna at endurtaka sigurin frá í fjør.

## Flogbóltsúrslit:

**Meistaradeild kvinnur**
ÍF-Fleyr 3-0 (25-20, 25-7, 25-22)
KÍF-TB 0-3 (10-25, 20-25, 16-25)
Mjølnir-Dráttur 3-0 (25-23, 25-17, 25-14)

**Meistaradeild, menn**
ÍF-Fleyr 3-0 (25-8, 25-13, 25-15)
Mjølnir-SÍ 1-3 (25-23, 23-25, 21-25, 18-25)

# Holte er við aftur

**Eftir tryggan 3-0 sigur á Gentofte tykist Holte nú aftur at vera partur av oddastríðnum í donsku elitudeildini**

FLOGBÓLTSÚTISETI
*Jákup Mørk*

Eftir at Holte tapti teir báðar fyrstu dystirnar í danska elitu-endaspælin-um, sá nakað svart út hjá liðnum, sum tá annars júst hevði vunnið steypakappingina.

Sum vera man, so var hetta ikki nakað, sum hóvaði Bárði og teimum, men nú tykist tað tó vera soleiðis, at liðið er um at koma fyri seg aftur.

Leygardagin vitjaði Holte í Gentofta, har stigaleysa heimaliðið hevði alneyðugan tørv á stigum, um teir skuldu røkka nøkrum sum helst, meðan Holte hinvegin eisini hevði tørv sá stigum, til tess at fylgja við í oddastríðnum.

Og tá avtornaði, so var eingin stórvegis ivi. Holte vann tryggan 3-0 sigur, og vóru settúrslitini somikið sannførandi sum 21, 14 og 21 til mótstøðuliðið.

Sjálvur sigur Bárður, at teir hava arbeitt ógvuliga hart við verjuspælinum seinastu tíðina, og at hetta veruliga var nakað, sum gav úrslit leygardagin.

- Saman við verjuspælinum og góðum servitrýsti syrgdu vit fyri, at Gentofte ongan tíð kom veruliga inn í dystin, og tað í sjálvum sær var positivt at síggja. Hartil lagaði dysturin seg eisini soleiðis, at allir mans fingu spælitíð, og tað var bara hugaligt at síggja, hvussu góð breiddin á liðnum tykist vera. Ikki minst nú fleiri av føstu leikarunum dragast við smáskaðar.

Komandi sunnudag fær Holte vitjan av HIK Ålborg, og longu nú líkist hetta einum sera tøttum og spennandi dysti.

ÍF-Fleyr 3-0 (25-8, 25-13, 25-15):

# Kósin varð rættað

**Eftir at beina gullkósin hevur verið heldur knortlugt seinastu dystirnar, gjørdu fuglfirðingar bart, tá Fleyr vitjaði fríggjadagin**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbólturin í Fuglafirði hevur sum heild havt tað gott í ár, men seinstu vikurnar hava tó givið nakrar skeinur í lakkið. Eftir at teir annars hava tókst fullkomuliga einaráðandi, hava menninir hjá ÍF snávað tvær ferðir seinastu vikurnar, otg nú bert eitt stig var niður til Mjølnir, var av álvara farið at sansa at.

Tí var sera umráðandi hjá liðnum at reisa seg, tá Fleyr vitjaði. Ikki tí. Móti Fleyr vildi alt annað enn ein 3-0 sigur verið at rokna sum ein sensatión, men fyri at fáa spæligleðina aftur er ofta tørvur á nøkrum succésupplivingum, og tað var fyrst og fremst hesar, sum tað ráddi um at fáa. Ikki minst nú bert ein vika er eftir til steypafinaluna.

### Í posa og sekk

Og ikki kann sigast annað enn, at fuglfirðingarnir fingu í bæði posa og sekk. Fleyr varð sent til hús við einan 38 stigum býtt yvir trý skjót sett, og tað sigur helst tað mesta av tí, sum er at siga um tann dystin.

Gjørdist lagið í ÍF betri av hesum, so gjørdist tað ikki minni gott, tá úrslitini frá hinum dystunum frættist sunnudagin. At SÍ megnaði at vinna dystin í Klaksvík mundi í øllum førum vera ein seinkað jólagáva av teimum heilt stóru hjá ÍF.

Teir eru nú trý stig undan næstu liðunum, og tó at tað enn eru tríggir dystir eftir at leika, so skal tað vilja meira enn illa til, um gullið skal gleppa teimum av hondum. Gaman í hevur ÍF torførastu dystarskránna eftir av oddaliðunum, men sum gongdin hevur veirð í ár, so kann roknast við, at ÍF í øllum førum fýra av seks stigum, og gera teir tað, so vilja teir helst leggja vertin á, hvussu hini liðini standa seg.